# TILTØK

**Gudstænastur Sexagesima**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri KFUK í Havn
*Argir:* kl. 11 deyvagudstænasta við altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Deyvameinigheitina
*Hestur:* kl. 12, Heri Joensen. Talvan gongur fyri KFUK í Havn
*Havnar kirkja:* kl. 11, Jóannis Fonsdal
*Havnar kirkja:* Musikkgudstænasta »Vesper« verður í Havnar kirkju sunnukvøldið kl. 20 við kóri Glyvra kirkju og Meinhardi Bjartalíð, presti
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein
*Kollafjørður:* kl. 12, Marjun Bæk
*Sandavágur:* kl. 12, David Johannesen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Heimamissióna
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer. Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri Heimamissiónina
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
*Norðskála:* kl. 12, familjugudst., Meinhard Bjartalíð
*Skála:* kl. 11, Bjarni Bæk, dómpróstur
*Selatrað:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson. Í Sjóvar prestagjaldi gongur talvan fyri Heidningamissiónina.
*Fuglafjørður:* kl. 12, Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri kirkjuligu Heimamissiónina
*Skúvoy:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen. Talvan gongur í Sandoyar Prestagjaldi fyri Heimamissiónina.
*Tjørnuvík:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Eiðis prestagjald:* Talvan gongur í øllum kirkjum fyri Heimamissiónina.
*Haldórsvíkar kirkja:* Komandi sunnudag gongur talvan í Haldórsvíkar kirkju fyri Heimamissiónina
*Sumba:* kl. 12, Patrick de Neergaard
*Sandvík:* kl. 12 Ólavur Rasmussen

**Missiónshúsið v/Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni og einki møti í Missiónshúsinum.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 Møti, Steindor Hjartalin og Tórbjørn Lágadal vitna og syngja. Eingin sunnudagsskúli og eingin familjutími ella møti sunnudag seinnapart vegna jarðarferð.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøtir.
www.salvos.com/torshavn

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Mánakvøldið kl. 21.30 Bíbliugransking: Dánielsbók.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, evnið: »Góðir vanar í samkomuni« og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 verður evnið: »Tsunami og Gud« - hví? ella hvat?
Á báðum møtunum talar Jógvan Z. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Drekkamunnur verður millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir. www.livdin.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Marna Nattestad.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC – Evnið: »Hjúnabandið« 1. partur, kl. 18 Sjónvarpsmøti – felagsmøti við Evangeliihúsinum.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Torsten Jortzick prestur, í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar.
Heimasíða www.katolsk.fo

**Meinigheitshúsið**
**Missiónsvika er hesa vikuna:**
Leygardagin kl. 20 Møti v/ Hera Eltør, Gratia syngur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, Gentukórið syngur, kl. 18 Møti v/ Hera Eltør, Manskórið syngur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti, har Gunnar Nielsen talar.
Mánadagin kl. 19 Ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk. www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vakhús í Sandavági**
Evangel. møti verður í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Herman og Gigga syngja. Palli Højgaard talar. Tórmund og fleiri luttaka.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting, Steve Dulwich talar. Verið hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.

**Miðvágs missiónshús**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Hjartaliga vælkomin.

**Møtir í skúlanum í Miðvági**
Fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 Opið hús fyri ungdóm, verður eisini leygarkvøldið. Talarar Poul Færø o.a. Sangbólkurin Sela og John Færø o.o. úr Betesda syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Jógvan Steintún tosar um hirðar. Hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Leif Høj.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, einki møti. Víst verður til missiónsvikuna í Rituvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin. Missiónsvikan byrjar sunnukvøldið við familjumøti kl. 18. Annelisa Rasmussen talar og barnakórið í Thabor syngur. Savnað verður inn til húsið. Eftir møti er felags náttурði.
Mánakvøldið kl. 20 Møti, Uni Næs talar og Tofta Streingjakór syngur.
Týskvøldið kl. 20 talar Gimmi Olsen og Thaborkórið og Hannis Hansen syngja.

**Karmel á Eiði**
Møti verður sunnukvøldið kl. 19 við Egil Joensen.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti á Toftum er avlýst vegna missiónsviku í Rituvík kl. 20. Bilar koyra frá missiónshúsinum kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Jógvan Fríðriksson heldur almennan fyrilestur mikukvøldið 2. februar kl. 19.00. Evnið: »Nærvera«.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Møti verður sunnudagin kl. 18 við Øssur Steinhólm, kl. 21 Ungdómsmøti við Marius Jacobsen. Øll eru vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Eyðbjørn Jacobsen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti har sunnudagsskúlin luttekur, ung syngja og André Matras talar. Náttturði er aftaná. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 15 »Jesus Vinir« barnamøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Fríur vitnisburður.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan.
Mánakvøldið kl. 19 kemur ungdómurin saman frá 7. fl. og eldri.
Missiónsvikan verður í døgunum 17.-20. februar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti. Streingjakórið syngur. Malan Hentze talar. Øll eru vælkomin.

**Framtíðin í Vági**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti, kl. 22.30 Sangmøti hvar ymisk koma at luttaka.
Sunnukvøldið kl. 20 Møti. Hesi luttaka við talu, sangi og vitnisburði. Thomas J. Askham, Gulak og Jónhilda Hansen, Hallmar og Hedvig Winther, Jørgin Fr. og Hjørdis Jørgensen, Nimrod og Ebba Midjord. Regin Drangberg, Álvheðin Jaocbsen, Jóanes Mortensen, Árni Kjærbæk, Gentukórið í Sumba, Trioin í Soli Deo Gloria í Klaksvík. Bønartænasta svarar á 597597. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# BRÚDLEYP

Leygardagin 26. februar kl. 10.00 giftast í Rituvíkar kirkju Hanna Olsen, Rituvík og Ásmundur Hansen, Søldarfjørður. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið, verða biðin um at ringja á tlf. 442036, 254250, 504970 ella 441396, 447774. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 5. mars 2005 kl. 16.00 giftast í Hvalbiar kirkju, Bettina Cjouanita Tummasardóttir Hentze úr Skopun og Dávur Holm úr Hvalba. Veitslan verður hildin í Roynhøllini í Hvalba,frá kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið á teirra stóra degi, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 260440, ella aftaná kl. 18.30 á tlf. 375036 áðrenn 10. februar 2005.

Leygardagin 5. mars kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Frida Mellemgaard og Jens Kristian Hansen, Tórshavn. Veitslan verður í B36 húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, verða biðin um at siga frá á tlf. 322324, 522324 ella 315609 áðrenn 18. februar.

# SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 9. februar hava Karl og Anna Sofía Vidtfeldt, Sandur, verið gift í 25 ár. Veitslan verður hildin í Ungmannafelagshúsinum Samljóð í Skopun 19. februar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá á tlf. 211584, 361584 ella 224946 áðrenn 3. februar 2005.

1. mars hava Emma og Daniel Johan Lisberg, Sumba, silvurbrúdleyp. Í tí sambandi verður vælkomst í Samkomuhúsinum í Sumba 26. februar frá kl. 12.00-18.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 10. februar á tlf. 370782.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Tit skulu verða sorgarbundnir, men sorg tykkara skal verða vend til gleði*
***Jóh. 16,20***

Jesus kundi ikki geva lærusveinum sínum – og tí heldur ikki okkum – lyfti um at sleppa undan sorg og mótgangi. Grundin er tann, at so leingi sum syndin og tí eisini ófullkomileiki er í heiminum, verður ikki øðrvísi. Krossin mugu vit øll bera hvør í sínum lagi. Men krossarnir eru ymiskir. Tú sært, hvat tú sjálvur mást bera, men ikki altíð hvat ið onnur mugu bera. Tað kann vera onkur, sum í tínum eygum livir eitt lív í eydnu og so kann tað kortini vera mangt og hvat, sum nívir, ið er fjalt fyri eygum tínum.

Tað er ein stórur sannleiki í hesari gomlu halgisøguni: Tað var ein, sum gramdi seg um, at krossur hansara var alt ov tungur at bera. Tá sendi Guð ein eingil til hansara og eingilin segði við hann: »Kom við mær. Nú skalt tú sleppa at velja tær ein annan kross«. Eingilin førdi mannin út á ein stað, har nógvir krossar vóru – ymiskir í støddi og skapi – og segði: »Vel nú«. Maðurin fór so at velja, men illa bar til. Krossarnir vóru annaðhvørt ov stórir ella ov tungir, ella okkurt annað var í vegin, til hann fann ein, sum var soleiðis vorðin, at hann kundi siga. »Lat meg fáa henda krossin, hesin hóskar mær«. Og hann fekk hann. Men tá var tað júst sami gamli krossur hansara, sum hann framman undan hevði gramt seg um. Soleiðis hevði ein og hvør sítt at bera.

Vit kunnu væl í dreymum okkara ímynda okkum sólskinsdagar uttan kross og trongdir í heiminum, men vit náa ongantíð hesum máli, og tó skulu vit stremba fram ímóti tí. Stríð og arbeiði í hesum heimi fyri friði, rættvísi og kærleika, er ikki nakað, sum vit skulu leggja á hillina fyri tað.

Sagt verður, at einaferð rópti Guð á Ádam og spurdi: »Hvar ert tú?« Ikki eru so fá, sum hava vent spurninginum við og spurt. »Hvar ert tú Guð? Neyð, sorg og vanlukkur raka mannabørnini, men tú tykist hvørki at siga ella at gera nakað. Og hví sleppa summi lættari enn onnur? Gert tú mismun? Hvar ert tú, Guð?« og Guð svarar: »Hvar ert tú menniskja? Vilt tú vera hond mín, fótur mín, muður mín, til tess at hjalpa og gera gagnsverk, har tú hevur møguleika til tess? Vilt tú kenna tína ábyrgd og gera títt til, at tað góða kann vinna frama?« Soleiðis er. Vit fáa einki nøktandi svar á spurningin um hitt ónda í heiminum, hví munurin er so stórur á eydnu og óeydnu manna millum. Vit eiga tí heldur ikki at læsa okkum føst í sovornum spurningum, sum vit ikki hava nakað svar uppá kortini, men heldur geva okkum í Guðs hendur og so fara til arbeiðis, har vit nú einaferð eru sett, og kenna okkara ábyrgd og uppgávu.

Her í heiminum verður tað vist ikki øðrvísi. Men tá ið vit fara yvirum til hitt æviga ljósið og ikki longur liva í trúgv, men í skoðan, koma vit til fulnar at sanna, at eitt er, sum ongantíð ferst: Guðs ríki og gleðin honum.

**Emil Olsen, prestur**